

## Tryggari at keypa á alnótini

Frá 1. september 2008 verður tað tryggari at keypa í handlum, sum eru tilmeldaðir altjóða trygdarfyriskipanunum Verified by Visa og MasterCard SecureCode. Hetta skrivar Suðuroyar Sparikassi á heimasíðuni. Tá ið tú keypir í einum handili á alnótini, sum er tilmeldaður altjóða trygdarfyriskipanunum Verified frá Visa og MasterCard SecureCode, verður tú biðin um at stovna antin eina Verified by Visa kotu ella eina MasterCard SecureCode. Síðani skal tú brúka hesa kotuna framyvir, tá ið tú keypir í handlum á alnótini, sum eru tilmeldaðir Verified by Visa og MasterCard SecureCode, skrivar sparikassin.

# Gerhard ikki partur av andstøðuni



**Hóast Gerhard Lognberg ikki er partur av samgonguni, so hevur hann ongar ætlanir at atkvøða ímóti øllum samgonguuppskotum**

POLITIKKUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Javnaðartingmaðurin, Gerhard Lognberg, sum í seinastu viku varð koyrdur úr tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum og longu hevur lagt uppskot fram saman við andstøðuni, er ikki partur av andstøðuni á Tinginum.

- Eg ætli mær at atkvøða mál fyri mál og havi ongar ætlanir um at atkvøða ímóti samgongumálum bara fyri at vera ímóti, sigur hann við Sosialin.

Fríggjadagin legði Gerhard Lognberg saman við andstøðuni uppskot fyri Ting, um at landsstýriskvinnan í samferðslumálum skal hava fígging til at fyrireika samráðingar við partafelagið handan privatu verkætlanina um Eysturoyartunnil.

Men hetta skal ikki tulkast sum, at Sandoyar tingmaðurin nú er partur av andstøðuni, leggur Gerhard Lognberg áherslu á.

### Ikki ráð til tveir tunnlar

Tað kann kanska undra, at sandoyartingmaðurin, sum hevur verið hart ímóti, at Eysturoyartunnilin verður gjørdur áðrenn Sandoyartunnilin, leggur eitt slíkt uppskot fram. Men sambært Gerhardi Lognberg sjálvum er hetta púra logiskt.

- Eg havi altíð verið ímóti, at Eysturoyartunnilin verður almennur, tí tað almenna hevur ikki ráð til at gera eina íløgu á tvær milliardir umframt Sandoyartunnilin, sigur Gerhard Lognberg.

Hann heldur, at um tað almenna skal gera Eysturoyartunnilin, er eingin vón fyri nøkrum Sandoyartunnli tey næstu mongu árini.

- Eg havi ikki lagt hetta uppskotið fram fyri at provokera, men tí eg veruliga ikki haldi, at tað almenna hevur ráð at gera bæði Skálafjarðatunnilin og Sandoyartunnilin.

Og prátið um at tunnilin millum Eysturoynna og miðstaðarøki skal kunna fíggja Sandoyartunnilin trýr hann ikki uppá.

- Eg vænti ikki, at Eysturoyartunnilin fer at verða nøkur stór pengamskina. Og skal fíggingin til Sandoyartunnilin kom har frá, so ganga í øllum førum nógv ár.

# Sjálvstýrisflokkurin vil ikki gerast partur av ósemjunum

**Kári P. Højgaard afturvísir ikki, at eitt samstarv við samgonguna kann formaliserast seinni, men sum støðan er nú vil Sjálvstýrisflokkurin á ongan hátt gerast partur av samgonguni og ósemjunum har, men fer at gera sítt til, at ávís mál verða borin ígjøgnum í tinginum, so samgongan er arbeiðsfør**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Landsnevnd Sjálvstýrisfloksins kom herfyri ið tíðindaskrivi, har sagt verður, at flokkurin verður ikki partur av samgonguni, men at mælt verður til breitt politiskt samstarv og at samráðingar skulu takast upp um at loysa átrokandi mál, so um t.d. fíggjarlógina, og nevndin stuðlar tingmonnum floksins í at royna at vinna flokkinum ávirkan.

Orðini hava - saman við útmeldingum frá Kára P. Højgaard í dag, vakt eitt sindur av undran, tí eitt sindur ógreitt tyksist framvegis vera, hvar flokkurin í veruleikanum stendur.

Kári P. Højgaard skilir als ikki, at støða floksins tykist ógreið.

Eru tit ikki í veruleikanum stuðulsflokkur hjá samgonguni?

- Tað skuldi verið púra greitt, hvat vit meina. Landsnevndin kallaði tingmanningina á fund og sigur sína støðu. Vit eru ikki partur av samgonguni og fara á ongan hátt at vera tað, og eru ikki stuðulsflokkur, sigur Kári P. Højgaard.

- Samgongan hevur staðið í stað í eitt hálvt ár. Fokus má nú setast á ávís mál, og semja fáast um at koyra tey ígjøgnum, tí nøkur mál hava skund, sigur Kári P. Højgaard.

### Ræðast ikki nýval

Vit eru í eini ynskistøðu í veruleikanum. Og vit ræðast als ikki eitt val og í veruleikanum meti eg tað vera løgið, at ongin veljarakanning er gjørd, tí eg ivist ikki í at Sjálvstýrisflokkurin hevði staðið seg væl. Men Føroya fólk hevur krav uppá eina arbeiðsføra samgongu. Vit hava fleiri mál, sum eru samanfallandi við tey, ið samgongan hevur arbeitt við, sigur Kári P. Højgaard.

### Kanska formaliserast seinni

Hann vil tó ikki kalla Sjálvstýrisflokkin stuðulsflokk hjá samgonguni, men sigur seg hinvegin sjálvsagt ikki kunna afturvísa, at samstarvið við samgonguna verður formaliserað seinni.

- Tað gongur so skjótt, og broytinar kunnu henda so skjótt, sigur Kári P. Højgaard.

- Tað vit ynskja, eru trygg politisk viðurskifti. Fokus má nú setast á ymsu málini, tí stórar verkætlanir hava bundið samgonguarbeiðið niður og skapt ósemjur. Tunnilsverkætlanirnar kunnu ikki forða eini almennari fíggjarlóg, og vit hava sagt, at 48.000 fólk klára ikki at bera slíkar íløgur hesi 4 árini.

- Flokkurin er í miðjuni og kann samstarva báðar vegir, sigur Kári P. Højgaard.

Hann sigur, at nú løgmaður má leita sær stuðul frá andstøðuni, so hevur Sjálvstýrisflokurin hurðina opna, men hann vil ikki kallast partur av samgonguni.

- Hetta er ein tillagingartíð. So sær ein, hvat ber til, sigur Kári P. Højgaard, og legur afturat, at ein veit hvat ein hevur, og ikki hvat ein fær, og flokkurin metur, at eitt nývæl eftir einum hálvum ári er at halda fólk fyri spott.

## Tíðindaskriv frá Sjálvstýrisflokkinum

Landsnevnd Sjálvstýrisfloksins gevur tingmanningini fullan stuðul í royndini at tryggja flokkinum ávirkan við breiðum samstarvi á tingi.

Landsnevndin mælir tingbólkinum frá at fara uppí sitandi samgongu, men vísir til landsfundarsamtyktina frá apríl í ár um breitt politiskt samstarv.

Vegna politiskt ótryggu støðuna í samgonguni, metir landsnevndin heldur ikki, at Sjálvstýrisflokkurin eigur at gerast stuðulsflokkur hjá sitandi samgongu.

Sjálvstýrisflokkurin leggur dent á, at ábyrgdarfullur politikkur verður førdur, soleiðis at arbeiðsfriður aftur fæst á Føroya Løgtingi.

Tí mælir landsnevndin tingbólkinum til at taka upp samráðingar um at loysa átrokandi mál, serstakliga fíggjarlógina fyri 2009.